# Sjómansheimið spennir seg út

**Á Hotel Tórshavn ella Sjómansheiminum, sum tey flestu framvegis rópa tað, bjóða tey nú eitt stórfingið jólaborð.**

BÝARLÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kappingin er hørð um at fáa fatur á teimum, sum fara út at eta. Nógvastaðnis verður lýst við jólaborðum, og á Sjómansheiminum ætla tey ikki at standa aftan fyri kappingarneytarnar.

Fyri stuttum fekk Sjómansheimið skeinkiloyvi, og nú bjóða tey eitt stórsligið jólaborð, sum er at fáa hvørt kvøld frá klokkan seks. Afturvið ber so til at fáa sær bæði vín, øl ella bara eina sodavatn, alt eftir hvat ein hevur hug til.

Á jólaborðinum er mangt gott at fáa, so sum dunna, rivjasteik, laksur, rækjur, kjøtfrikadellir, rís a la mande og annað gott.

Fleiri aðrar matstovur hava líknandi tilboð, og tí hava kundarnir ivaleyst at velja millum.



*Stórfingna jólaborðið á Hotel Tórshavn ella Sjómansheiminum, sum nú er at fáa hvørt kvøld frá klokkan 18.*

*Mynd: Terji Nielsen*

# - Serstakliga friðarligt vikuskifti

**Kring alt landið siga politistøðirnar frá einum serstakliga friðarligum vikuskifti. Hvørki í Eysturoynni ella í Klaksvík hevur løgreglan havt nakað sum helst at gjørt.**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tà ið vit sunnudagin høvdu samband við ávíkavist politiið í Eysturoynni og í Norðoyggjum í telefonini, vóru boðini greið úr báðum støðum:

- Vit hava havt eitt óvanliga friðarligt vikuskifti, og tað hevur einki sum helst verið at gjørt. Eingin er tikin fyri at koyra fullur, einki ferðsluóhapp hevur verið, og tað hevur verið serstakliga friðarligt, var sagt á báðum politistøðunum.

# Óhapp við Vágatunnilin

Eisini løgreglan í Havn boðaði frá einari serstakliga friðarligum vikuskifti. Leygarnáttina var ein maður tikin fyri at koyra fullur á einum prutli á Eystara Ringvegi, og hann var tikin við á politistøðina, har blóðroynd varð tikin.

Sunnudagin var ein kvinnuligur bilførari tikin fyri at koyra við kenning, og hon var eisini tikin við á politistøðina.

Um sekstíðina sunnumorgunin var eitt lítið ferðsluóhapp uttan fyri tunnilsmunnan til Vágatunnilin Streymoyarmegin, og ein persónur varð fluttur á skaðastovuna til nærri kanningar.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at tað annars hevur verið eitt sera friðarligt vikuskifti, og at tað ikki hevur verið so nógv fólk í býnum. Vakthavandi væntar tó, at komandi vikuskifti verður væl meira av fólki í býnum, tí tá fara jólaborðhaldini av álvara at taka dik á seg

# Kommunuskatturin í Klaksvík óbroyttur

Á býráðsfundi hóskvøldið samtykti Klaksvíkar býráð, at kommunuskatturin skal verða óbroyttur, 20,75 %, og at barnafrádrátturin framhaldandi verður 4.000 krónur.

Fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar kommunu fyri 2006 gevur harvið eitt hall upp á góðar 27 milliónir. Tá eru íløgur upp á góðar 47 milliónir og avdráttir upp á 7 milliónir taldar við, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu.

**tn**

# Ferðslutrygdin gloymd

**Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur sent løgmanni og landsstýrismanninum í ferðslumálum skriv, har heitt verður á teir, at ferðslutrygdin verður sett í hásæti í sambandi við ætlanina um at knýta saman Skálafjørðin og høvuðsstaðin**

FERÐSLUTRYGD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið fundur herfyri um Skálafjarðartunlarnar var á Svangaskarði herfyri, var orðið ferðslutrygd als ikki havt á lofti. Fyrireikingarbólkurin legði projektið fram fyri fundarfólkinum, men ongantíð varð tosað um ferðslutrygdina í framløguni.



*Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sigur seg verða skelkaða av, at einki hevur verið nevnt um ferðslutrygdina í sambandi við hesar verkætlanirnar.*

**Neyðugt at hava ferðslutrygdina í huga**

Í skrivinum heitir Ráðið fyri Ferðslutrygd á løgmann og landsstýrismannin, at ferðslutrygdin ikki verður gloymd, nú málið skal hava politiska viðgerð.

Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, var við á fundinum á Svangaskarði, og hon var skelkað av, at ferðslutrygdin als ikki bleiv umrødd. Ein einstakur persónur nevndi ein lokalan trupulleika, s um fór at koma, um ferðslan kom at ganga gjøgnum eina ávísa bygd.

Í lesarabrævi í blaðnum í dag vísir Rúna Sivertsen á, at tað er neyðugt, at vit hesaferð fyrst hugsa um ferðslutrygdina. Í síðsta enda kemur ferðslustrygdin at hava ávirkan á kostnaðin í mun til nyttuna. Tí er tað óðamannaverk at leggja enn eina landsferðsluæðr gjøgnum fleiri bygdir, sigur Rúna Sivertsen í brævinum.

Eisini vísir Rúna Sivertsen á, at hetta ikki er einasta verkætlan í sambandi við vegagerð, har tað als ikki verður hugsað um ferðslutrygdina. Hon vísir til dømis á, at í sambandi við øktu ferðsluna, sum er væntandi, tá ið Norðoyatunnilin verður liðugur, er als ikki tosað um.

- Tá kemur ferðslan at vaksa nógv, og tann ferðslan fer millum annað gjøgnum Gøtugjógv, Skipanes, Kollafjørð og aðrar bygdir, men ferðslutrygdin hevur als ikki verið nevnd í hesum sambandi, sigur Rúna Sivertsen. Forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd sigur, at tað er hennara vón, at lesarabrævið hjá henni kann verða við til, at gongd kemur á kjakið um ferðslutrygdina í sambandi við verkætlanirnar.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo